Álit

í

løgtingsmáli nr. 79/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning (Tøknilig rætting í sambandi við avgjald á leyst snús, sum inniheldur tubbak)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 29. januar 2026, og eftir 1. viðgerð 5. februar 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. februar 2026.

Uppskotið snýr seg um at gera eina lógartøkniliga rætting í sambandi við løgtingsmál nr. 18/2025. Í sambandi við løgtingsmál nr. 18/2025, ið hækkar avgjøldini á snús og tubbak, hevur tað víst seg at vera neyðugt at gera eina lógartøkniliga rætting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

Hesum tekur ein samd nevnd undir við og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 18. februar 2026

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	